# Jatnatøk í stór

**FRÆLSUR ÍTRÓTTUR** Altjóða kappingin í frælsum ítrótti, Jatnatøk, sum var leygardagin á Tórsbreyt, eydnaðist sera væl. Fleiri góð úrslit vóru, umframt eitt føroyskt met, og bæði luttakarar og áskoðarar fingu nógv burturúr

Hilmar Jan Hansen

Fyri fyrstu ferð nakrantíð var Tórsbreyt karmur um eina altjóða kapping, tá stóra ítróttarøkið leygardagin hýsti opnu kappingini, Jatnatøk, ið hevði umleið 20 føroyskar íðkarar, umframt 10 íðkarar úr Svøríki, Danmark og Íslandi – sum eisini sást aftur á norðurlendsku fløggunum, ið veittraðu yvir Tórsbreyt.

Væta var í luftini og tað var heldur grátt í veðrinum ta fyrstu løtuna av kappingini, men sum tíðin gekk, klárnaði tað og gjørdist heilt gott veður við lítlum og ongum vindi. Streymslitið hjá SEV spældi tó eisini eitt puss, tí tað forðaði fyri, at elektroniska tíðtøkan kundi fáast at virka beinanvegin.

Men í aðrar mátar gekk alt upp á stás, og ikki minst var svenski frásøgumaðurin, Daniel Bergin, við til at geva kappingini tað altjóða snittið, ið skuldi til, tá hann hevði fleiri bóltar í luftini í senn, men púra trygt fekk kunnað áskoðararnar, ið so líðandi gjørdust alsamt fleiri í tali, væl og virðiliga um fleiri kappingar í senn. Hann hevur royndir frá stórum kappingum í Svøríki, so sum DN Galan, og tað bæði sást og hoyrdist eisini!





### Røgvi og Rúni vunnu

Fyrstu kappingarnar, ið fóru í gongd, vóru hæddarlop hjá kvinnum og síðani monnum, spjótkast hjá monnum og 800 metra renning fyrst hjá monnum og síðani kvinnum.

Í hæddarlopi hjá kvinnum leyp svenski favoritturin, Sofie Björklund, 164 sentimetrar og vann framman fyri Lív Svabo Jónsdóttir, sum er hálvur føroyingur úr Íslandi, og svensku Natalie Westman. Hjá monnum var svenski Jakob Sandman stórfavorittur og vann við 181 sentimetrum, men afturfyri var kappingin hørð um næstu plássini, ið fóru til ávíkavist Kristian Martin Garðalíð og Steinolv Geyti, ið báðir lupu 156 sentimetrar.

Í spjótkasti vóru tveir bólkar, menn og dreingir 14-15 ár. Hjá monnum vann Røgvi Højgaard sannførandi við einum kasti upp á 54,07 metrar, og so var tætt millum Helga Geyta, Høgna Debes og Trónd Arge, ið tóku næstu plássini. Í bólkinum dreingir 14-15 ár vóru bara tveir íðkarar, men spenningurin var so mikið størri, tí Hallur Simonsen lá allan vegin beint framman fyri svenska Felix Nilsson, sum tó megnaði at yvirhála í síðsta kastinum, tá hann kom upp á 30,27 metrar.

Í 800 metra renning hjá monnum var Rúni Seloy favorittur og vann eisini sannførandi við tíðini tveir minuttir og 7,5 sekund framman fyri Hans Jacobsen og síðani svenska Linus AppelSkjutar á triðja plássi. Hjá kvinnunum vann svenska Natalie Tolvers, sum var hálvttriðja sekund framman fyri Bjørk Herup Olsen, og beint í hølunum á teimum kom Rebekka Fuglø.

### Føroyskt met

Síðani vóru kappingar í 5.000 metra renning hjá kvinnum og monnum, slegguvarpi hjá kvinnum, trístøkki hjá kvinnum og at enda 100 metra renning hjá bæði kvinnum og monnum.

Hjá monnunum royndist Meinard Ortind drúgvastur á 5.000 metra teininum við tíðini 17 minuttir og 41,6 sekund og var hann góðar tveir minuttir framman fyri Brian Smedemark. Sum nevnt aðrastaðni á ítróttarsíðunum, vann Bjørk Herup Olsen 5.000 metra

## Sera nøgdur svenskari

Millum útlendsku gestirnar í altjóða kappingini í frælsum ítrótti, Jatnatøk, á Tórvølli leygardagin, var 21 ára gamli svenskarin, Linus Appel Skjutar, sum íðkar í felagnum Hammarby IF.

– Hetta er fyri meg sera spennandi, tí hetta er mín fyrsta altjóða kapping. Eg eri eisini sera væl nøgdur við mín innsats á 800 metrum, har eg í einari javnari kapping fekk bronsu og megnaði at betra mína persónligu tíð við einum sekundi, segði hann brosandi, tá vit hittu hann á Tórsbreyt, sum hann gekk og tók myndir av hinum íðkandi, nú hann sjálvur var liðugur við sítt.

– Veðrið bleiv bara heilt gott nú, hóast tað byrjaði eitt sindur vátt. Eg havi tosað eitt sindur við hini, og tey lata eisini væl at kappingini, sjálvt um vit ikki ordiliga eru von við slíkan vind og kulda í juli mánaði, tí heima í Svøríki er munandi betri veður júst nú.

Linus Appel Skjutar dámdi væl at vera til kappingina, sum samstundis var hansara fyrsta høvi at vitja Føroyar.

– Hetta er stak hugnaligt og ein møguleiki at fáa nýggjar vinir, tí tú kemur at práta við fólk, tú kanska annars ikki hittir til aðrar kappingar. Og hóast vit ikki hava verið so nógvir íðkarar, haldi eg, at her hava verið fleiri fin úrslit í dag, segði hann.

*hilmarjan@sosialurin.fo*